# Bilar

Magnus Magnusson
maggi@sosialurin.fo






# KIRKJUKLOK RINGJA FYRI

**FERRARI** Kirkjuklokkurnar í Maranello, heimbýnum hjá Ferrari í Italia, ringja, tá Ferrari vinna í Formel 1 kappkoyring

Tá Ferrari vinna í Formel 1, er tað vanligt at kirkjuklokkurnar ringja í heimbýnum Maranello í Italia. Tað gjørdu tær t.d. herfyri, tá fyrrverandi heimsmeistarin í formel 1, spaniólin Fernando Alonso, í síni fyrstu koyring fyri Ferrari, vann í Bahrein.

Ferrari býurin Maranello er í dag eitt av stóru ferðamálunum í Evropa. Ferðafólkini vitja t.d. Formel 1 banan í Immola, savnið Galleria Ferrari, testbanan Fiorano, Ferrari Club Maranello og sjálva Ferrari verksmiðjuna.

Eingin av rasara- ella sportsbilunum í øllum heiminum hevur nátt somu málum sum Ferrari, hvørki í søguligum baksýni ella í dag, har teir gera heimsins fremstu sportsbilar.

Stovnarin av Ferrari, Enzo Ferrari (1898-1988), sum í 1940 stovnaði Enzo Ferrari fyritøkuna "Auto Avio Costuzioni Ferrari", vildi ongantíð gera kompromis við nakran um kvalitetin á bilunum, ella hvussu skjótt teir kundu koyra. Tí bleiv framleiðslan so dýr, at teir í 1969 løgdu saman við Fiat.

Tilsamans hava Ferrari síðan byrjan framleitt umleið 100.000 bilar, har umleið 80.000 koyra enn í dag.

Spanski Formel 1 koyrarin, 28 ára gamli **Fernando Alonso**, koyrir í dag fyri Ferrari. Í 2005 vann hann Formula One World Driver's Championship. Hann var tá 24 ára gamal og tann yngsti sum tá hevði vunnið hendan heiður.